


*Við bókini "Sigursteinurin" roynir virkni Potter-týðarin Bergur Rasmussen seg nú sjálvur sum rithøvundur*

# Nýggj føroysk søgn

**Søgnin um sigursteinin hjá ravninum hevur givið íblástur til nýggja barnabók, sum Bergur Rasmussen hevur skrivað**

BÓKAÚTGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Bergur Rasmussen dugir annað enn at týða Harry Potter. Eftir mong ár sum fastur týðari hjá Bókadeildini roynir hann seg nú sjálvur sum rithøvundur við bókini *Sigursteinurin*.

Við sær hevur hann unga myndprýðaran Silju Strøm, sum gongur á listaskúla í Skotlandi og hevur lagt stórt arbeiði í at gera øðrvísi, spennandi myndir til bókina.

### Grundað á gamla søgn

Í bókini *Sigursteinurin*, sum er grundað á gomlu søgnina um sigursteinin hjá ravninum, hittast gentan Erla og vætturin Sópikinn.

Erla hoyrir okkurt skav aftan fyri seg og vendir sær á: "Har stóð eitt grátt skepilsi á gólvinum framman fyri skápinum. Erla hvein. Gráa skepilsið stakk uppfrá og vendi sær kvikliga…"

Sópikinn er úti í týðandi ørindum, og Erla er ein meinbogi á vegnum, so hann má taka eina skjóta avgerð, hvat gerast skal við gentuna.

Nógv stuttligt og spennandi spyrst burturúr sambandinum millum vætturin og gentuna ella millum tað forniska og nútíðina. Vit fara ikki at avdúka, hvat hendir, men lata lesarar sjálvar fara eina øðrvísi ferð saman við Sópikinni.

Bókin er eisini sera væl egnað sum upplestrarbók í hesum myrku, hugnaligu tíðum frammanundan jólum.

*Sigursteinurin* er 148 bls., myndprýðingarnar eru í litum.

# Yvir 40 kappast um bestu stuttsøguna

**Nú freistin er úti, eru 44 stuttsøgur komnar inn til stuttsøgukappingina, sum Bókadeildin fór undir í heyst**

STUTTSØGUKAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Stórur áhugi hevur verið fyri stuttsøgukappingini, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags lýsti við fyrst í september í ár. Heili 44 stuttsøgur eru komnar inn, og eru er tær bæði úr Føroyum og útlondum, so nógv eru, sum vilja royna seg í kynstrinum at skriva stuttsøgu fyri ungdóm.

### Kemur væl við

Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeildini, fegnast um áhugan og sigur, at hetta kemur væl við, av tí at tað hevur verið soltið við skrivaðum søgum, sum er egnaðar til nútímans føroyskan ungdóm.

Nú verða søgurnar allar latnar bókmentaligu nevndini hjá forlagnum, og síðan skulu tey velja eina ella tvær vinnarasøgur.

Tey, ið vinna kappingina, fáa 12.000 kr hvør, sum Eik Banki letur, umframt at tey sleppa á ráðstevnu saman við fólki á forløgum í Føroyum og Norðurlondum, við drúgvum royndum í ritstjórnararbeiði. Harumframt verður kendur bókmentagranskari við, sum skal halda fyrilestur og annars geva frá sær góð ráð um at skriva.

Hetta verður eisini gylt høvi hjá teimum báðum føroysku vinnarunum at sleppa at vera saman við øðrum bæði royndum og óroyndum rithøvundum úr teimum seks londunum úr norði.

Ráðstevnan, sum Kulturkontakt Nord stuðlar, er sett at vera í februar komandi ár, men longu undan jólum fáa luttakararnir í skrivikappingini boð um, hvør hevur vunnið spennandi kappingina.



*Bókmentaliga nevndi hjá Bókadeildini fer nú at velja eina ella tvær vinnarasøgur úr rúgvuni av søgum, sum eru komnar inn*





